# Finnbogi Ísakson umhugsar sína støðu

**Hóast vit enn ikki vita, hvussu samgongumøguleikarnir verða eftir næsta val, so heldur ein av royndu tjóðveldispolitikarunum gjøgnum skjótt 35 ár, Finnbogi Ísakson, at tað er skeivt at læsa seg so fastan, at tað bara verða tveir blokkar. Hann heldur, at Tjóðveldisflokkurin skal ongantíð læsa seg so fastan, at hann bara kann brúkast í andstøðu.**



*Ein av tungu kanónunum í Tjóðveldisflokkinum, Finnbogi Ísakson hevur enn ikki gjørt av, um hann fer at stilla uppaftur til løgtingsvalið.*

UPPSTILLING OG LØGTINGSVAL

*Jan Müller*

Valfeburin er av álvara farin at gera um seg. Tað sæst og hoyrist eitt nú á lýsingunum frá valfeløgunum, sum so smátt eru farin at hugsa um uppstillingina til løgtingsvalið. Tað verður í seinasta lagi 30. apríl komandi ár ella um gott og væl eitt hálvt ár.

Flokkarnir eru so smátt farnir undir uppstillingarfundirnar. Vit hava longu hoyrt um 1. uppstillingarfundin hjá Sambandsflokkinum á Strondum. Javnaðarflokkurin í høvuðsstaðnum hevði sín fyrsta uppstillingarfund mikukvøldið, og Tjóðveldisflokkurin í Suðurstreymoy hevði fyrsta uppstillingarfundin næstsíðsta mánakvøld.

Av tí at talan er um 1. uppstillingarfundir ber í flestu førum ikki til at siga við vissu, hvussu endaligu listarnir koma at síggja út. Vit hava eisini skilt á lagnum, at tað á fundunum hjá Tjóðveldisflokkinum og Javnaðarflokkinum í Havn varð ikki atkvøtt um, hvør skal koma á listan. Tað verður gjørt á øðrum og triðja uppstillingarfundunum. Í staðin varð fyrsti uppstillingarfundurin brúktur til at koma við uppskotum um, hvørji skulu kappast um at koma upp á listan.

Millum tey, sum vóru í uppskoti á fundinum hjá Tjóðveldisfelagnum í Havn vóru tey fýra umboðini, sum í hesum valskeiðnum umboða Suðurstreymoyar valdømi í landspolitikkinum. Á valinum í 1998 fekk Tjóðveldisflokkurin í Suðurstreymoy tríggjar umdømisvaldar tingmenn. Tað vóru Høgni Hoydal, Annita á Fríðriksmørk og Finnbogi Ísakson. Tá Høgni Hoydal fór í landsstýrið, kom Finnur Helmsdal í løgtingið.

Umframt tey omanfyri nevndu vóru millum hini, sum vóru í uppskoti, Hildur Patursson, sum viðhvørt hevur verið avloysari í hesum valskeiðnum, og býráðslimirnir Jógvan Arge og Leivur Hansen, og so Karin Kjølbro. Haraftrat vóru eisini mong onnur nøvn.

Á uppstillingarfundinum hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðurstreymi mánakvøldið var Finnbogi Ísakson í uppskoti at koma á listan. Men Finnbogi Ísakson vildi ikki á fundinum siga, um hann er sinnaður at stilla upp aftur. Løgtingsformaðurin segði, at hann á øðrum uppstillingarfundi fer at boða frá, um hann ætlar at stilla uppaftur ella ikki.

### 35 ár síðani fyrstu ferð

Finnbogi Ísakson er tann av núverandi tinglimunum, sum varð fyrst valdur í løgtingið. Longu í 1966 var Finnbogi Ísakson, sum tá var 23 ára gamal, valdur inn á ting fyri Tjóðveldisflokkin í Norðoyggjum. 8. november í ár eru sostatt 35 ár síðani tann ungi tjóðveldismaðurin fyrstu ferð setti fót sín innum tinggátt.

Finnbogi umboðaði Tjóðveldisflokkin í Norðoyggjum inntil í 1984, tá hann ikki stillaði uppaftur. Tá hann í 1988 stillaði uppaftur, var tað í Suðurstreymi. Har kom hann á ting, tá Jóngerð Purkhús fór í landsstýrið. Síðani 1990 hevur Finnbogi verið valdur hvørja ferð í Suðurstreymoyar valdømi. Hann hevur verið landsstýrismaður fleiri ferðir, og í hesum valskeiðnum er hann løgtingsformaður.

Tað er eingin loyna, at tað millum manna hevur verið gitt, um Finnbogi Ísakson fór at stilla upp aftur til løgtingið. Hann sigur við Sosialin, at skuldi hann funnið uppá at tikið seg aftur, so vildi tað ikki verið á 1. uppstillingarfundinum. – Lat meg siga tað soleiðis: eg umhugsi støðuna.

Uppá fyripspurning um hann hevur orku til at royna enn eitt skeið sigur Finnbogi Ísakson, at tað hevur hann nokk. Aldurin er so heldur ikki meira enn 58. Og líkindi at fáa nakað líkinda starv eru kanska heldur ikki so góð. Hugurin at halda fram er eisini til steðar.

– Men hví so ikki taka eitt tørn aftrat: – Tá man hevur verið so leingi í politikki, so er tað ein spurningur, nær tú skal gevast. Kappingin er eisini sera stór staðfestir tingmaðurin.

### Ansa eftir blokkum

Tað er einki dulsmál, at tað í Tjóðveldisflokkinum eins og í øllum øðrum flokkum eru ymsar meiningar um, hvør er skilabesta kósin at halda, hóast semja kann vera um grundsjónarmiðini. Og Finnbogi Ísakson hevur verið mettur at hoyra til tann gamla og meira hóvliga partin av flokkinum. Tað kom tí ikki dátt við, tá hann í sambandi við føðingardagshald hjá einum av tingmonnunum á Gamla Apoteki fyrr í ár segði seg sakna stórri samstarv millum flokkarnar og nevndi í tí sambandinum, at formenninir í stóru flokkunum fyrr dugdu betur at samstarva tvørtur um blokkmark. – Og tað meini eg framvegis leggur hesin royndi politikarin aftrat.

Tá spurt verður um samgongumøguleikum eftir næsta val er Finnbogi Ísakson eitt sindur varin. – Er meiriluti fyri eina samgongu, sum vil fara úr ríkinum, ið er høvuðsendamálið hjá Tjóðveldisflokkinum, so má man rokna við, at Tjóðveldisflokkurin vil halda fram í tí samgonguni. Men hinvegin kann man ikki siga, at møguleikarnir fyri øðrum samgongum ikki eru til steðar. Tað veldst um, hvussu valúrslitið sær út. Man kann ikki læsa seg so fastan, at tað bara verða tveir blokkar og so ikki meira.

– Hevur tú varhugan av, at Tjóðveldisflokkurin síðani formansskiftið hevur læst seg ov fustan til bara tveir blokkar í føroyskum politikki?

– Nú gjørdist støðan so serstøk eftir seinasta val. Tað er nokk meira tað sum hevur ført til, at tað sær út sum tað bara eru tveir blokkar í løtuni. Verður valúrslitið eitt sindur øðrvísi so sær myndin væl eisini øðrvísi út.

– Men sær tú ein vanda við tí blokkpolitiska linju, sum leiðslan í flokkinum hevur valt, at Tjóðveldisflokkurin kann koma at útiloka seg sjálvan eftir valið?

– Tað vóni eg í hvussu er ikki. Men eg haldi, at Tjóðveldisflokkurin skal ongantíð læsa seg so fastan, at hann bara kann brúkast í andstøðu.

### Karin Kjølbro ikki aftur

Millum hini uppskotini á uppstillingarfundinum hjá flokkinum í høvuðsstaðnum var eisini Karin Kjølbro, sum sat í løgtinginum frá 1978 og fram til 1990. Karin var – saman við Jonu Henriksen – fyrsta kvinnan, sum varð vald á ting. Frammanundan høvdu Malla Samuelsen og Jona Henriksen verið í tinginum sum eykalimir fyri ávikavíst Marius Johannsen úr Sjálvstýrisflokkinum og Jákup Lindenskov úr Javnaðarflokkinum.

Tað eru uttan iva mong tjóðveldisfólk, sum vildu ynskt at sæð Karina aftur í politiki, tí hon var júst ein markant løgtingskvinna. Hon hevði stóran áhuga fyri kvinnuspurningum og sosialpolitikki, men hon gjørdi eisini vart við seg, tá t. d. stóru skipapakkarnir vórðu viðgjørdir í áttati árunum. Karin hevði fleiri ferðir sjónarmið, sum avgjørt ikki vóru í tráð við sjónarmiðini hjá teimum, sum tóku avgerðirnar og sum hon var í samgongu við. Heldur ikki hjá teimum, sum høvdu valdið í hennara egna flokki.

Men hvat sigur Karin Kjølbro so sjálv til at verða í uppskoti til valevni til komandi løgtingsval: – Eg var ikki á fundinum og veit einki um hatta. Tá eg fór úr politikki, so fór eg. Tað var ikki við tí fyri at koma aftur, og tað hevur heldur ongantíð verið í huga mínum at gerast virkin politikari aftur. Karin Kjølbro vil heldur hava, at ung og nýggj fólk skulu koma framat. Hon hevur framvegis stóran áhuga fyri politikki og vil gera sítt at lyfta við. – Man kann royna at lívga um sín flokk uttan, at man er aktivur politikari. Eg havi havt mína tíð. Royndi at arbeiða nógv ta tíð tað var og haldi meg ikki av avlopsorku til tað longur.

## Leki í Sellafield kann gerast verri enn Tjernobyl

Ein nýggj ES-frágreiðing staðfestir, at eitt óhapp á endurvinningarverkinum Sellafield kann fáa álvarssamari avleiðingar enn spreingingin á kjarnorkuverkinum Tjernobyl í Ukraina fyri fimtan árum síðani.

Umhvørvisfelagsskapir og onnur hava leingi kravt, at bretsku myndugleikarnir skulu steingja verkið í Sellafield, og nú verður hildið, at tann nýggja frágreiðingin fer at gera, at trýstið á bretsku stjórnina verður uppaftur størri.

Sellafield-verkið er bara tíggju fjórðingar frá írsku strondini, og írsku myndugleikarnir hava leingi sagt seg bera ótta fyri, hvat kann henda, um eitt óhapp hendir á verkinum Yvirgangsatsóknin í USA tann 11. september hevur ikki gjørt fólk tryggari, og sambært bretsku tíðindastovuni Reuter verður tað ikki mætari, tá innihaldið í nýggju ES-frágreiðingini verður alment.

– Langtíðar avleiðingarnar av einum leka á Sellafield-verkinum kunnu gerast munandi vandameiri enn avleiðingarnar av Tjernobyl-vanlukkuni. Hetta kemst serliga av teimum stóru nøgdunum av cesium-137, sum eru í tangum á Sellafield-verkinum, stendur m. a. í frágreiðingini, sum umhvørvisstovnurin Wise Paris hevur gjørt fyri ES-myndugleikarnar.

Kanningar hava longu staðfest, at geislavirkna dálkingin frá Sellafield-verkinum er longu størri enn tað, sum ES-nevndin og OSPAR-samtyktin um vernd av vistfrøðini í havinum meta ráðiligt.

(Fartekst)

## Aftur stríð um deyðarevsing í USA

Myndugleikarnir í amerikanska statinum Texas avrættaðu mánadagin tann 33 ára gamla drápsmannin Gerald Mitchell, sum var dømdur til deyða fyri eitt morð fyri 16 árum síðani.

Gerald Mitchell bleiv avrættaður við eiturinnsprænging. Hann er tann 14., sum er avrættaður í Texas í ár.

Mannarættindafelagsskapir sum Amnesty International og Human Rights Watch høvdu biðið dómsvaldið ógylda deyðadómin, so Gerald Mitchell kundi fáa lívlanga fongsulsrevsing ístaðin, men uttan úrslit.

Lagnan hjá tí 33 ára gamla drápsmanninum varð endaliga staðfest, tá hægstirættur mánadagin havnaði einari áheitan um grið, samstundis sum guvernørurin í Texas, Rick Perry, vísti aftur einari áheitan um at útseta avrættingina 30 dagar.

19 av teimum 253, sum eru vorðin avrættað, síðani amerikanski hægstirættur ógyldaði forboðið ímóti deyðarevsing fyri 25 árum síðani, vóru yngri enn 18 ár, tá tey framdu lógarbrotið, sum tey seinni vórðu dømd til deyða fyri.

(Fartekst)

## USA vil hava Ísrael at taka seg aftur

Samstundis skal Yasser Arafat steðga teimum víðgongdu palestinsku felagsskapunum.

Amerikanska stjórnin vil nú hava ísraelsku stjórnina at taka sínar herdeildir og stríðsvognar úr teimum umráðum, sum palestinsku sjálvstýrismyndugleikarnir hava umsjón við. Samstundis skal ísraelska stjórnin lova, at hon fer ikki at senda hermenn ella stríðsvognar til teir palestinsku býirnar aftur.

So greið vóru boðini, sum talsmaðurin hjá uttanríkisráðnum í Washington, Philip Reeker, kom við í gjár.

– Vit hava skilt á ísraelsku stjórnini, at hon ætlar at taka hermenninar og stríðsvognarnar aftur. Tað eigur Ísrael eisini at gera alt fyri eitt, og hetta seinasta átakið eigur eisini at vera tað seinasta av hesum slagnum, segði Philip Reeker.

Samstundis mælti hann palestinska leiðaranum Yasser Arafat til at gera alt, sum gerast kann, til tess at steðga harðskapinum og yvirgangnum. Philip Reeker helt eisini, at teir palestinsku myndugleikarnir eiga at revsa teir, sum mótarbeiða áhugamálunum hjá palestinska fólkinum.

Palestinska trygdarráðið segði mánadagin, at teir, sum myrdu ísraelska ráðharran Rehavam Zeevi, arbeiddu ímóti palestinsku áhugamálunum. Ísraelska stjórnin hevur kravt at fáa teir, sum myrdu ráðharran, men tí hevur Arafat sýtt fyri.

Ísraelski herurin hevur lopið á fleiri mál seinastu dagarnar, og meira enn 20 palestinar eru deyðir í álopunum.

(Fartekst)

ítróttur

Nr. 205 • mikudagur • 24. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Allan valdi tryggu loysnina

**Nú hann skal verða landsliðsvenjari í Luksemborg verður góður møguleiki hjá Allani Simonsen at nýta royndirnar, sum hann hevur fingið í Føroyum, og tað fer at bera illa til at gera hann til tapara**

LUKSEMBORG OG LANDSLIÐSVENJARIN

*Jóannes Hansen*

Allan Simonsen fer komandi árini at hava sama setningin at røkja, sum hann hevur havt tey átta árini, hann hevur verið landsliðsvenjari í Føroyum.

Tað er skil í tingunum hjá Allani. Fyrst varð tað kunngjørt, at hann ikki fór at halda fram í Føroyum, so var hann í Føroyum og segði farvæl, og tá hann var gott og væl komin aftur til Danmarkar, vórðu tíðindini mánakvøldið almenn um, at nú verður Allan Simonsen landsliðsvenjari hjá Luksemborg.

Í Luksemborg skal Allan Simonsen loysa Paul Phillip av. Hann er ættaður úr Luksemborg og hevur havt venjarastarvið í 17 ár. Tað er heimsmet fyri allar teir venjararnar, sum nú hava ábyrgdina av landsliðum.

Tá Luksemborg 1. september í ódnarveðri tapti 1–0 á Svangaskarði, var Paul Phillip illa hýrdur. Tá fregnaðust tíðindamenninir hjá Luksemborg fyri at vita, hvussu nógv Allan Simonsen fekk í løn. Teir vistu at siga, at teirra venjari fekk meiri enn tvær ferðir so nógv, sum venjarin hjá føroyska liðnum, og tað er nevyan sannlíkt, at Allan Simonsen er verri løntur, enn nú fyrrverandi venjarin hjá Luksemborg var.

### Royndur sum fáur

Tað er ein venjari við



*Krøvini til Allan Simonsen í Luksemborg verða, at hann skal útinna somu uppgávu, sum hann hevur gjørt í Føroyum*

ógvuliga nøgvum altjóða royndum, sum Luksemborg nú hevur fingið. Allan Simonsen stóð á odda fyri føroyska landsliðnum í 52 dystum. Allan Simonsen er í DBU skrásettur at hava spælt 56 landsdystir og at hava skorað 21 mál. Men hetta er ikki heilt rætt talið. DBU gjørdi í síni tíð av, at ein dystur, sum Allan Simonsen spældi á einum europeiskum úrvalsliði ímóti italska landsliðnum, skuldi telja sum landsdystur. Dysturin varð spældur 25. februar í 1981 á olympiska leikvøllinum í Rom. Inntøkan fór til tey í Italia, sum um hetta mundið vóru rakt av jarðskjálvta. Europa liðið vann 3–0, og Allan Simonsen skoraði eftir 33 minuttir fyrsta málið.

Umframt at hava verið landsliðsvenjari og at hava verið landsliðsspælari, so hevur nýggi venjarin hjá Luksemborg so nógvar royndir sum nakar frá altjóða dystum fyri lið – fyrst og fremst frá teimum trimum Europa Cup kappingunum (meistarar, steypavinnarar og UEFA).

### Sami setningur

Tað hevur verið nevnt fleiri ferðir, at nú skuldi Allan Simonsen royna størri avbjóðingar. Men fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin hevur valt eina avbjóðing, sum er akkurát tann sama sum tann, ið hann nú hevur sagt farvæl til.

Luksemborg telist millum minstu fótbóltstjóðirnar í Europa. Úrslitini hjá teimum hava tey seinastu árini verið lakari, enn tey hjá Føroyum hava verið. Men tað hava teir onkrir glottar, t. d. tá teir í HM undankappingini taptu 2–1 á heimavølli ímóti Russlandi.

Krøvini til Allan Simonsen verða, at hann skal útinna somu uppgávu, sum hann hevur gjørt í Føroyum. Í Føroyum hevur hann víst seg hava havt hegni til hetta. Um tað ikki eydnast á sama hátt í Luksemborg, so verður trýstið á venjaranum ikki so stórt, sum tað verður á spælarunum og teimum, sum hava ábyrgdina av karmunum kring landsliðið. Tað hevur Allan Simonsen neyvan nakað ímóti, tí hann er frá tíðini í Borrusia Mönchen Gladbach og serliga Barcelona mettaður av trýsti frá øllum síðum.

Føroyingar kunnu ikki annað enn ynskja Allani Simonsen alt tað besta í nýggju avbjóðingini. Eftir at UEFA hevur flokkað europeisku tjóðirnar til EM undankappingar lutakastið er tað ikki serliga sannlíkt, at Føroyar og Luksemborg aftur koma í bólk saman. Men nú mátti tað ligið væl fyri hjá Fótbóltssambandinum at fingið avtalu um vinadystir millum Luksemborg og Føroyar – á heimavølli og útivølli. Men tað kann sjálvsagt ikki gerast, fyrrenn FSF hevur gjørt avtalu við ein nýggjan landsliðsvenjara.

### Kenslurnar gera ikki mannin minni

Farvæl samkoman saman við Allani Simonsen fríggjadagin gjørdist ivaleyst meiri kensluborin, enn nakar hevði ímyndað sær. Tá ein spælari frá átjan ára aldri og í sjey ár hevur verið skúlaður í Týskalandi, so er nærliggjandi at hugsa sær, at alt, sum eitur kenslur, er programmerað burtur.

Fríggjadagin sást, at soleiðis er tað ikki hjá Allani Simonsen, og tað ger hann ikki til minni mann – í hvussu so er ikki í eygunum á føroyingum.

### Fimtan ára gamalt minni

Hetta var ikki fyrsta ferðin, at kenslurnar fóru við Allani Simonsen í farvæl støðu.

Eftir at hann í fyrsta dystinum í EM endaspælinum í Fraklandi í 1984 hevði brotið beinið, megnaði Allan Simonsen ikki at endurvinna sjálvsagda plássið á landsliðnum hjá Sepp Piontek, men hann var við í danska hópinum í HM endaspælinum í Meksiko í 1986. Eftir heimkomuna var greitt, at Allan ikki skuldi halda fram á landsliðnum.

Hann fekk kortini høvi at siga farvæl í Ítróttarparkini í Keypmannahavn, sum tað tá kallaðist, og tað gjørdist ein kenslurík løta.

Mótstøðuliðið var Vesturtýskaland, sum vann 2–0. Undan dystarbyrjan stóð Allan Simonsen saman við liðfeløgunum – millum teirra vóru m. a. núverandi venjararnir hjá Danmark Morten Olsen og Michael Laudrup – og lurtaði, meðan 43.000 áskoðarar sungu tjóðsangin.

At tað yvirhøvur kom fram, hvat bylgdist í Allani Simonsen hesa løtuna, syrgdi ein myndamaður hjá Politiken fyri. Hann var eitt sindur seinur til dystin. Tá hann setti fótin inn á vøllin, fóru teir at syngja tjóðsangin. Hann noyddist at standa stillur. Hann setti myndatólið við størstu linsuni fyri eygað og smekkaði til. Úrslitið fór kring allan heimin. Talan var um nærmynd av Allani Simonsen, og klokkuklár sóust tárini í eygnakrókunum.

Myndin varð kosin besta pressumyndin í 1986, og hon gjørdist eisini kend uttanfyri Danmark. Allan spældi 21 mínuttir, so varð hann skiftur út við John Eriksen. Lógvabrestirnir dundu omanyvir grasvøllin, og Allani Simonsen var ógvuliga rørdur.

Um myndirnar og upptøkurnar í ÍSF húsinum síðsta fríggjadag hava verið frammi uttanfyri føroysku landoddarnar, hava vit einki hoyrt um.

Men nú snýr tað seg um Luksemborg, og tað ynskja vit Allani Simonsen alt tað besta við!

## Botnurin vann á toppinum

**AGF lyfti seg upp um niðurflytingarstrikuna, og munurin øktist millum AaB og Brøndby**

SUPERLIGAN

*Jóannes Hansen*

Síðsti dysturin í trettanda umfarinum í superliguni var mánakvøldið á skránni í Aalborg. Næstfremsta liðið, AaB, hevði vitjan av næstaftasta liðnum, AGF.

Í spælinum var stórur munur á. Men tað var botnliðið, sum var omaná. AGF spældi hugflogsríkt og sannførandi, meðan AaB var sera skinklut í verjupartinum og vísti einki hugflog í álopspartinum.

Tá ikki stórt meiri enn tíggju minuttir vóru farnir, var AGF á odda við tveimum málum, og tað kom AaB seg ongantíð eftir. Bæði málini vórðu skorað uttanvert brotsteigin, og í báðum førunum hevði botnliðið marginalirnar við sær – tað plaga annars at vera teir, sum frammanundan eru væl fyri, ið hava marginalirnar við sær.

Í 2. hálvleiki royndi AaB at koma afturíaftur. Og tá teir tíðliga í 2. hálvleiki eftir hornaspark høvdu minkað um munin, lá í luftini, at tað skuldi eydnast. Men eftir lítlari løtu fór luftin úr spenningsballónini. AGF økti til 3–1, og beinanvegin aftaná sá toppskjúttin hjá AaB, Indrek Zelinski, reytt fyri fullkomuliga høvuðleysa hevnisøku.

Nocko Jockovic varð skiftur inn, og hann stútaði til 4–1.

Sigurin hevði við sær, at AGF lyfti seg upp um Vejle, sum nú er niðan fyri niðurflytingarstrikuna.

Í AGF er lagið gott. Í síðstu viku fingu teir lyfti frá góðum vinum um, at fleiri milliónir skulu leggjast í felagið, mánakvøldið fingu teir trý stig, og tað vísti seg, at pólverski spælarin, sum teir hava leigað, er sannur fongur. Hann eitur Tomasz Mazurkiewicz. Hesin maðurin er liðformaður á pólverska OL landsliðinum. Hann skoraði til 2–0 ímóti AaB, og hyggjarnir hjá TV3+ valdu hann til besta spælara í Aalborg.